**Sjómanskvinnuringurin á Strondum**
bjóðar til hugnakvøld í fimleikarhøllini sunnukvøldið 19. okt kl. 19.
Niels Jacob Nielsen innleiðir og Henning Bøgesvang sigur frá. Nógvur sangur við harmoniku. Eisini verður drekkamuður.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadagur 17. oktober kl. 21:00 Ungdómsmøti
Glyvra Praise
Sunnudagin kl. 17 Felagsmøti
Hugnaløta v/drekkamunni aftaná.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin 19. okt. verður sunnudagsskúli kl. 13.30 og møti kl. 19.00 við Alfred Olsen - evni: Bønarlív.
Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 20: Útgávukonsert við Zamar.
Leygarkvøldið kl. 21: Awake við Paula Høj.
Sunnudagin kl. 11: Morgunmøti við Paula Høj. Sangur við Kristinu N. Hansen
Barnamøti kl. 11.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Sjómanskvinnuringurin Skála - Strendur**
kemur saman til alment hugnakvøld 22.10.2008 kl. 19.30 í Meinigheitshúsinum á Skála, við vitjan av Jens Eli Ellefsen og øðrum. Hugleiðingar um Grønland og sangur. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Leygardagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 18 møti.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 14.30 verður sunnudagsskúli,
kl. 18 verður møti við manskórinum og
kl. 21 verður ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Badmintonhøllin í Klaksvík**
Stuðulskonsert verður í høllini leygarkvøldið kl. 19 til frama fyri tey fátæku í Rumenien, har Calarasi missiónin ger eitt hjálparbeiði. Hesi koma at luttaka Oasubrøðurnir, Oddbjørg Poulsen, Heini Lutzen og fl., Hallmar og Jógvan, Victor og Mirjam, Hanna og Terji. Manskórið í Tabor í Fuglafirði, Randi Nolsøe og Eclesia. 1/2 tíma áðrenn konsertina spælir ein harmonikubólkur. Innsamlan verður undir konsertini.

**KFUM & K Klaksvík**
Sunnudagin 19. okt. kl. 14 Sunnudagsskúli
kl. 17.30 Bønarløta
kl. 18 Møti við Bergur Debes Joensen – um bøn
Innsavnan til útimissión
kl. 21 Ungdómsmøti.

**Soli Deo Gloria**
Leygardagin kl. 10 ungdómsalpha.
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Daniel Banu úr Rumenia.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti. André Matras talar.
Leygardagin kl. 10 er morgunbøn.
Sunnudagin kl. 11 er møti.
Barnamøti er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Kalsoy**
Missiónsvika fyri alla oynna verður í Mikladals kirkju 1.-3. november.

**Betania, Skopun**
Leygardagin einki barnamøti vegna heystfrí.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti.
Mikudagin kl. 20 Bønarmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin eingin sunnudagsskúli vegna heystfrí. Kl. 18 møti. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagssskúli.
Vikuskiftismøtir verða leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18 við Atla Rasmussen, Klaksvík. Kórið av Tvøroyri syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Týskvøldið kl. 20 verður bibliutími og bønarløta. Evni: Mark kap 3.

**Missiónshúsið, Vágur**
Sunnudagin kl. 18 Møti.
Bønarmøti týskvøldið kl. 20.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Fríggjadagin kl. 9.30 orðið á borðið.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti /sunnudagskúli, kl. 18 evang. møti.

**Betania, Sumba**
Møti verður í Betania sunnukvøldið kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015
110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333.

**Felagið Tórshavn - gongutúrur**
Gongutúrur: Niðan við Fossá - Stóravatn, Kaldbak.
Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10. Havið heit og góð gonguklæðir og ein heitan drekkamunn og matpakka við.
Tilmelding á tlf. 302425 ella torsinfo@torshavn.fo

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf: 316491/286491*
*Fax 316481 á Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*
***Mánadagur 20. okt.***
kl. 9.00 -12.00 Horn- og beinarbeiði Rasmuns Nygaard
Tilmelding: 316491 .
Enn eru nøkur pláss eftir. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga
10.00 - Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
11.00 - Enskt talumál
14.00 - Kortspæl og onnur spøl
***Týsdagur***
kl. 9.00 - 11.15 Bólkur 1 Goyma og taka fram P. Poulsen
11.45 - 14.00 Bólkur 2 Teksviðgerð grundskeiðP. Poulsen
14.15 - 16.30 Bólkur 3 Teksviðgerð grundskeið P. Poulsen
10.00 - 11.30 Vit syngja Benny, Flemming og Eilif Samuelsen
Øll eru hjartaliga vælkomin
***Evinsdagur: MATUR OG HEILSA***
***14.00*** *Heilsugóður føroyskur matur, Jóhanna Tjaldrafløtti, Kostráðgevi*
***15.00*** *Steðgur. Í steðginum bjóðar NORDFRÁ heilsugóða fiskasuppu í kjallaranum*
***15.30*** *»Hvat er ein máltíð?« Bjørg Jacobsen fólkalívsfrøðingur*
*Evinsdagurin er eitt samstarv millum Tilhaldið og Heimavitjunartænastuna hjá Tórshavnar kommunu, sum hevur valt árstemaið: Matur og heilsa.*
*Endamálið við báðum tænastunum á eldraøkinum er, at tey gomlu skulu varðveita góða heilsu.*
***Mikudagur***
kl. 9 - 12 Maskinbinding v/ Maritu Guttesen
9 - 12 Veving v/ Joanu Bjarnastein
9 - 12 Horn- og beinarbeiði Rasmus Nygaard
Enn eru nøkur pláss eftir. Støkk inn á gólvið um hetta hevur tín áhuga
9 - 12 Bindiklubbur
Vit fyri reika okkum til jóla
Øll eru hjartaliga vælkomin
10.00 - 13.30 Matgerð Anne Grethe Harlou
15.00 Túrur: Viðalundin - Villingadalsvegur
Øll eru hjartaliga vælkomin Randi/ Elisabeth, fysioterapeutar
***Hósdagur***
kl. 10.00 Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
11.00 Lesibólkurin hittist aftur 30.okt
14.00 Boccia í kjallaranum
Vit fyrireika okkum til at kappast við sandoyingar 30.okt
***Fríggjadagur***
10 - 13.30 Matgerð Anne Grethe Harlou
10.00 - 17.00 Opið hús
Seinasti dagur fyri jólagávurnar (skóeskjurnar)
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið Fløvi, Glyvrar**
Tlf. 448279
Opið mánadag til fríggjadag frá kl. 15.00 til 18.00.:
Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.
***Skrá viku 43.***
***Mánadagur 20. okt.***
Telduhugni v. Jens Dalsgaard.
***Týsdagur 21. okt.***
Fimleikur og styrkivenjing v. Annu-Lis Petersen
***Mikudagur 22. okt.***
Opið hús.
***Hósdagur 23. okt.***
Felagssangur
***Fríggjadagur 24. okt.***
Boccia
Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
Opið er mánadag og týsdag frá kl. 13-17 og hósdag frá kl. 10-17.

**Frá Dagtilhaldinum Blákollan á Oyri**
Opið hús er týsag og hósdag frá kl. 14 -18.
Báðar dagar er ein góður drekkamuður at fáa.
***Týsdagin 21.10.08***
Knud Jacobsen hevur fyrilestur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Fuglafirði**
Vit hava opið týsdag, mikudag og hósdag kl. 15-18 í Luffustovu.

**Tilhaldið Hugnin**
Tilhaldið Hugnin í Sandoy hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mánadagin 20. okt.***
Vit lurta eftir »Ljósini slókna« eftir Elin Mortensen.
***Mikudagin 22. okt.***
Boccia í kjallaranum.

**Dagtilhaldið Vesturskin Toftir**
Opið týsdag, mikudag og hósdag frá kl 15-18. Øll eldri eru vælkomin.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík á tlf. 459091*
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag og Mikudag
kl. 13.30 – 17.30
Týsdag og Hósdag
kl. 09.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

***framhald á síðu 50***

**Brúdleyp**
Leygardagin 8/-11-08. kl. 15 giftast í Vesturkirkjuni Súsanna Johannesen, av Argjum og Bjarne Clausen, úr Havn. Brúdleypið verður fyri innboðin á Hotel Føroyum kl. 19.

**50 + 50 ár**
Leygardagin 15. november 2008 halda Rúna Franksdóttir og Jakob Holm, Argir føðingardag í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00. Tað hevði glett okkum at sæð familju, vinir og kenningar til henda dag. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá innan 9. november 2008 á tlf. 319858/210198 ella á teldupostí: jrholm@post.olivant.fo

23. oktobur verður Elinborg Hansen, búsitandi í Havn ættað úr Norðragøtu, 50 ár. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík fríggjadagin 31. okt kl. 19. Tekning til veitsluna á tlf. 44 10 68 ella 31 54 24 í seinasta lagi 20. okt. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**60 ára føðingardagur**
Týsdagin 28. oktober verður Elisabeth Matras-Olsen, Trongisvágur 60 ár. Dagurin verður hildin í Seglloftinum leygardagin 25. oktober kl. 19. Tey, ið vilja gleða meg við at koma, verða biðin um at siga frá innan 15. okt. á tlf. 371528 ella 263060.

**70 ára føðingardagur**
22.10.08 verður Sigrid M. Dalsgaard, Hoyvík, 70 ár. Føðingardagurin verður hildin 25.10.08 kl. 19.00 í matarhøllini í Føroya Studentarskúla og HF-skeiði í Hoydølum. Øll eru vælkomin.



**30 + 30 ár**
1. og 17. november vera Tóra Láberg og Sonja Tungá 30 ár. Føðingardagurin verður hildin í Samljóð í Skopun 1. november 08 kl. 18.00. Tey, sum vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 25. oktober á tlf. 222223 Tóra og 580075 Sonja.



Leygardagin 15. novembur kl. 13.00 giftast í Skála kirkju Paula S. Lervig av Skála og Óli Kristian á Torkilsheyggi av Nesi. Veitslan verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl 18.00. Tey, ið ynskja at hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 7. novembur á tlf. nr. 739093, 502050.

**80 ára føðingardagur**
Mikudagin 22. oktober fyllur Jóhanna Olsen (Lukkanna), Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin á Klaksvíkar Sjómannsheimi kl. 19.

Leygardagin 8. nov. kl. 18 heldur Leif Múller, Porkeri 80 ára føðingardag. Dagurin verður hildin í Sumba. Tey, ið vilja gleða meg við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 370538 ella 590538 innan 27. okt.

**Silvurbrúdleyp**
Mikudagin 5. november kunnu hjúnini Signa og Jóhan Joensen, Kollafirði halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Ítróttarhøllini í Kollafirði leygardagin 8. november kl. 1830. Tey, ið vilja halda dagin saman við okkum, verða biðin at siga frá á tlf. 721628, 213448 ella teldupost: johsig@post.olivant.fo, áðrenn 31. oktober.

Mikudagin 19. november hava Olea og Pætur E. Hansen, Leirvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 22. november í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða vinarligast biðin um at siga frá á tlf. 443200, 264350 ella 213250 innan 15. ovember.

**Gullbrúdleyp**
Týsdagin 25. november hava hjúnini Henny og Martin Juul Jarnskor, Norðragøta, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík 29. nov. kl. 18.00. Tey, ið ynskja at hátíðarhalda dagin saman við okkum, vera vinarliga biðin um at siga frá innan 15. nov. á tlf. 442192, 441795 (Anita) ella 441995 (Unn).



Leygardagin 25. oktober 2008 kl. 15 giftast í Rituvíkar kirkju Sigrid Eva á Kinn av Strondum og Súni Forná Olsen úr Rituvík. Brúdleypið verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.